# Ein kristin kriminalsak

**FØROYSKA SJÓMANSPRESTASTARVIÐ**

*Essayistur Ólavur Rasmussen*



## 6. og seinasti partur

Ólavur Petersen fekk í hvussu so er tað burturúr síni skriving, at onkur í mentamálaráðnum gjørdist forskrektur. Hesum visti Ólavur Petsersen bara ikki av, tí hann hevði ikki nóg stórt innlit í málinum.

Men eg visti, at onkur í mentamálaráðnum duldi eitt stórt loyndarmál, sum, um tað lak út, kundi fáa stórar avleiðingar. Eg visti eisini, at nevndin fyri føroysku sjómanskirkjuna duldi sama loyndarmál. Og eg visti eisini, at danska sjómanskirkjan duldi henda sama loynidóm sum mansmorð. Og eg visti, at Høgni Hoydal, sum tá var vorðin mentamálaráðharri, tók hetta loyndarmál í so stórum álvara, at hann avgjørdi, at alt málið um sjómanskirkjuna skuldi takast til nýggja viðgerð av somu nevnd, sum gjørdi áltið. Hetta skuldi gerast, áðrenn trýárasáttmálin millum føroysku sjómanskirkjuna og Føroya landsstýri rann út, nú móti vetri 2005. Avgerðin hjá Høgna bleiv kunngjørd í bløðunum, og er skjalfest í mentamálaráðnum.

So fall landsstýrið og Høgni fór frá. Hvat nú hendir er ein púra opin spurningur, og er tað høvuðsorsøkin til, at eg havi skrivað hesa greinarøð.

Loyndarmálið verður nevniliga enn tann dagin í dag dult sum mansmorð; at Hjørdis var kallað inn til setanarsamtalu í Keypmannahavn, áðrenn føroyska sjómanskirkjan hevði gjørt sína innstilling í Føroyum! Hetta var ikki bara óhoyrt, men beinleiðis óreiðiligt og eitt fúlt álop á føroysku sjómanskirkjuna, og á føroyska borgaran, sum rindaði allar pengarnar. Hesin markleysi frekleikin hjá Claus og Ronald avdúkaði tíverri, at teir onga sum helst virðing høvdu fyri hvørki landsstýrinum, føroysku sjómanskirkjuni ella siglandi føroyinginum. Tí at ein og hvør, sum kendi til mannagongdirnar hjá donsku sjómanskirkjuni visti frammanundan, at ein innkalling av einum umsøkjara var tað sama sum at viðkomandi de facto var settur í starvi.

Málið um føroysku sjómanskirkjuna var nú vorðið til eina kristna kriminalsak. Tá ið eg gekk uppi á Prestfjalli og umhugsaði, hvørt eg skuldi søkja ella ikki, kendi eg hetta loyndarmálið. Tá var tað at seiggið kom í meg at søkja starvið. Eg visti, at um eg varð innstillaður sum nummar eitt av føroysku sjómanskirkjuni, so sluppu Claus og Ronald ikki so lætt. Eg havi nógv vinfólk í donsku sjómanskirkjuni, og visti snøgt sagt ov nógv til at teir kundu sleppa at spæla hund. Um ikki annað kundi eg seta teimum knívin á strúpan, tí eg sat við lyklunum til eitt skáp, sum fjaldi ein loynidóm, ið ikki toldi dagsins ljós. So kundu teir sleppa at velja ímillum meg ella játtanina hjá landsstýrinum. Og eftirsum at teir vóru í dýrastu neyð fíggjarliga, kann ein og hvør rokna út, hvat teir høvdu valt. Teir vóru eisini sum smør, so leingi sum peningajáttina úr Føroyum var óviss.

Men Ronald og Claus tóku ein vælumhugsaðan kjans. Teir vistu sum var, at eg fekk millum lítla og onga undirtøku av prestunum at verða valdur í nevndina fyri føroysku sjómanskirkjuna, og tá ið eg ikki so frægt sum varð valdur í hesa nevnd, hóast eg einsamallur hevði fostrað uppskotið, so fór eg ongantíð at verða innstillaður sum nummar eitt av føroysku sjómanskirkjuni. Tí vóru teir leysir av tí einasta persóninum, sum kundi seta teir uppá pláss.

Onkur heldur kanska, at tað var falskt spæl av mær, ikki at gera vart við hetta loyndarmálið. Sannleikin er tann, at so skjótt sum eg fekk at vita, at Hjørdis var innkallað til starvssamtalu í Keypmannahavn, bað eg staðiliga nevndina í føroysku sjómanskirkjuni um at protestera, so at tað buldraði eftir í. Men nei, nevndin var helst bangin fyri, at tey 20%, sum tey høvdu fingið í olmussu frá Claus og Ronald, eisini fóru sín salta sjógv.

So gjørdi eg nakað annað, eg ringdi til mentamálaráðið og fortaldi einum av teimum heilt stóru embætismonnunum, hvat var hent, og bað eg hann um at síggja til, at landsstýrið protesteraði ímóti, at føroyskur peningur var misbrúktur á henda hátt. Embætismaðurin sló alt uppí glens og vaknaði ikki fyrr enn Høgni Hoydal tók um endan. Tá var tann føroyski embætismaðurin sum smør, og lovaði at taka sær av málinum, so at nevndin, sum gjørdi álitið, varð sett av nýggjum at evaluera alt málið. Í dag eri eg bangin fyri, at embætismaðurin hevur "gloymt" alt um hetta. Tíverri gav eg ikki Hans Jacob Joensen boð um, hvat var farið fram, tí so ivist eg ikki í, at ein reaktión var komin. Eg veit ikki hví eg ikki gjørdi tað, málið var eftirhondini vorðið so syndrað syndur, at eg nærum ikki visti hvat vendi niður og hvat vendi upp.

Innanhýsis í nevndini fyri føroysku sjómanskirkjuna hevur onkur róð frammundir, at talan ikki var um eina starvssamtalu, men um eina persónliga samtalu. Tað líkist akkurát Claus og Ronaldi at servera slíkt vrøvl fyri fólki. Hetta er í hvussu so er ein lodrøtt lygn, og kann tað dokumenterast, tí at proseduran í donsku sjómanskirkjuni var tá, at tey, sum eru innstillað, verða tikin inn til samtalu. Bara Hjørdis var til samtalu, eingin annar, hóast Andrias varð innstillaður sum nummar eitt, og Hjørdis als ikki kom uppá tal í femstu røð í føroysku innstillingini.

Eftir stendur so tann keðiligi spurningurin, um tann, sum letur seg snýta veruliga er snýttur. Ólavur Petersen hevur verið ógvuliga persónligur í sínum álopum á navngivnar persónar í samband við hetta málið. Serliga hevur hann lagt Jógvan Fríðriksson undir medvitandi at hava oyðilagt starvsmøguleikarnar hjá Andriasi.

Her eri eg fullkomiliga ósamdur, tí at Jógvan vil øllum væl, eisini Andriasi.

Men eg eri ómetaliga harmur um, at nevndin í føroysku sjómanskirkjuni hevur verið so himmalrópandi naiv, at tað nærkast reinum gallskapi. Hetta hevur einki við óndskap ella persónsforfylgingar at gera, sum Ólavur Petersen vil vera við, men at nevndin hevur verið bæði ódugnalig, óhjálpin og bláoygd, og tað kann bara tann diskutera, sum einki hevur at diskutera við. Var hetta ein nevnd hjá eini privatari fyritøku, so hevði tað straks fingið avleiðingar.

Men tað ringasta er, at hesin ódugnaskapur hevur elvt til nógv persónlig sár, og einki føroyskt andlit. Í staðin fyri eina livandi føroyska sjómanskirkju, sum virkar til frama fyri okkara siglandi fólk, okkara útisetar í Bretlandi, og einum líka so livandi andliti her heima hjá okkum, hava vit fingið eitt gapandi tómrúm. Nevndin var enntá so naiv og veik, at tá ið Hjørdis var kallað inn til starvssamtalu í Keypmannahavn, samstundis sum seriøsir umsøkjararar her heima hildu seg søkja undir púra vanligum treyum, læt nevndin sum luft. Ja, nevndin var so naiv, at hon avreiddi alt til donsku sjómanskirkjuna, so at játtanin hjá landsstýrinum endaði í privata dunnuhylinum hjá Claus Harms og Ronaldi Pedersen, so at teir kundu standa sterkari í samráðingunum við DKU. Teir fingu tað, teir vildu hava, pengar í egnan kassa og teirra egna danska prest, tí at ongin, sum hevði ábyrgdina her heima, var árvakin nokk til at gjøgnumskoða sjónleikin. Við øðrum orðum, nevndin í føroysku sjómanskirkjuni livdi ikki upp til sína ábyrgd. Ein kritikkur, sum sanniliga eisini rakar mentamálaráðið, ið var kunnað um hvat veruliga fór fram.



*Nevndin í føroysku sjómanskirkjuni hevur mælt Mentamálaráðnum til at leingja sáttmálan millum landsstýrið og føroysku sjómanskirkjuna, samstundis sum sáttmálin við Hjørdis skal leingjast. Spurningurin er: "Er landsstýrismaðurin kunnaður um tann stóra loynidómin, ella er hann líkaglaður?"*

Hvat hava vit fingið burtur úr? Hvør kennir annað til føroysku sjómanskirkjuna enn tað, sum Ólavur Petersen hevur skrivað? Hvat sigur politiski myndugleikin, sum í hesum døgum hevur fingið eitt tilmæli frá føroysku sjómanskirkjuni um at leingja sáttmálan við Føroya landstýri og Hjørdis. Og hví verður nevndin, sum gjørdi álitið, og sum Høgni Hoydal avgjørdi skuldi setast at eftirmeta málið, ikki sett? Um landsstýrismaðurin metir, at tað er mín persónur, sum er trupulleikin, so skal eg taka meg aftur úr nevndini, og lata sessin til onkran annan, t.d. Una Næs, okkara álitismann, sum ikki er bangin fyri at havast at, um hann heldur tað er neyðugt. Uttan at eg á nakran hátt havi tosað við hann um hetta mál. Og hvussu ber tað til, at landsstýrismaðurin í mentamálum letur tað fara óátalað afturvið borðinum, at danska sjómanskirkjan tók sín kandidat til starvssamtalu, áðrenn nøkur innstilling varð gjørd í Føroyum. Eg havi ein sterkan illgruna um, at landsstýrismaðurin einki veit um hetta.

Eg vil fegin hava føroysku sjómanskirkjuna at halda fram. Men eg havi mist álitið á, at eitt orð er eitt orð í hesum máli. Tíðin er komin til, at politikararnir vakna, og krevja, at pengarnir hjá borgarunum verða brúktir til annað enn til ein glantrileik hjá Ronald Petersen og Claus Harms.

Ì dag eru nýggjar tíðir í donsku sjómanskirkjuni, sum nú er løgd saman vi DKU. Har varð mett, at tann nýggja felags kirkjuorganisatiónin trongdi til eina upprudding, og bæði Claus Harms og Ronald Pedersen eru burtur haðani. Vit treingja so sanniliga eisini til at fáa slætt borð her í Føroyum, og eina veruliga nýggja byrjan.

Eg havi einki ímóti Hjørdis, hon er ikki annað enn ein brikkur í talvinum, har aðrir hava flutt fólkið. Hon er fullkomiliga sakleys í hesum máli, men hon hevur langt síðan prógvað, at hon ikki megnar at geva føroysku sjómanskirkjuni eitt føroyskt andlit bæði útvortis og innvortis, tí at hennara andlit er danskt. Tað var eisini einasta grundin til, at hon varð kallað inn til starvssamtalu, áðrenn nakrir bláoygdir føroyingar skiltu poingið.

Tíðin er, við øðrum orðum, komin til, at peningurin hjá borgarunum verður brúktur til eitt gott føroyskt endamál. Hetta er alneyðugt, um vanæringin ikki skal vera fullkomin. Tí mæli eg til, at tann føroyski sáttmálin við Hjørdis gongur út í seinasta lagi veturin 2006, tá ið hennara sáttmáli við donsku sjómanskirkjuna eisini er útrunnin. Sáttmálin millum føroysku sjómanskirkjuna og Hjørdis rennur út um nakrar vikur, samstundis sum sáttmálin millum landsstýrið og føroysku sjómanskirkjuna gongur út. So har er ríkiligt av møguleikum at rudda upp og lýsa starvið leyst av nýggjum. Og eg mæli til, at tað straks verður funnin ein leistur, soleiðis at tragisku og óreiðiligu setanarviðurskiftini ikki endurtaka seg. Og eg mæli til, at nevndin, sum gjørdi álitið, verður sett at fara til verka, ongantíð ov skjótt, soleiðis at hjartabarnið kann fáa eitt skap, sum sømir seg eini siglandi tjóð, eins og Høgni Hoydal, vegna Føroya landsstýri, gav boð um. Tí tað kann ikki vera rætt, at nevndin í føroysku sjómanskirkjuni, sum hevur kostað bæði umsøkjarum, borgarum og landsins myndugleikum so nógv sár og so nógvan kleyvarskap, skal sita í sínum egna kongaríki, og meta um egnan naivitet, so fittir og skilagóðir hesir prestarnir eru í aðrar mátar.

Landsstýrið einsamalt hevur ábyrgdina av, at tann peningurin, sum verður játtaður, verður brúktur á so skynsaman hátt sum gjørligt. Hetta eru, hóast alt, fólksins pengar. Nakrar smávegis broytingar gera hvørki til ella frá, sum tann afturvendandi ónøgdin við føroysku sjómanskirkjuna, ið kemur til sjóndar í føroysku bløðunum, er besta prógvið um. Ein ónøgd, sum bara er toppurin av ísfjallinum.

Politiski myndugleikin kann ikki skjóta seg inn undir, at hetta ikki er teirra borð. Tí at trýára sáttmálin millum føroysku sjómanskirkjuna og Føroya landsstýri rennur út um nakrar vikur. Mentamálaráðið situr í skrivandi løtu og tekur støðu til málið, ráðført av monnum, sum í denn grad eru involveraðir.

Mín leiklutur í hesum máli er ivaleyst endaliga avgreiddur, men tað er heldur ikki tað, sum tað snýr seg um. Men minsta kravið má vera so mikið av reiðiligheit, at føroyskir umsøkjarar í framtíðini ikki verða givnir fullkomiliga upp til skutils. Tað var í hvussu er ikki tað, sum var ætlanin, tá ið eg umborð á Smyrli fekk hugskotið at stovna eitt føroyskt sjómansprestastarv.

Nú er nokk snorkað í bláoygdum skammlopum.